

*Claus Andersen: -Tað er ikki meiningin, at vit skulu gera júst tað sama arbeiði sum oljufeløgini, men vit skulu tryggja okkum, at tey halda avtalurnar, og at tey gera eitt professionelt arbeiði. Claus Andersen her stæddur á framsýningini hjá Náttúrugripasavninum á Debesartrøð, sum konan Anette Jægerup hevur verið við til at seta upp*

*Mynd: Jan Müller*

# Vakthundurin – hevur eyguni við oljufeløgunum

**Hann virkar sum eitt slag av millumliði millum oljufeløgini og føroysku stovnarnar. Skal m.a. tryggja, at alt fer rætt fram, at avtalurnar, sum verða gjørdar við myndugleikarnar, verða hildnar og eru í lagi. Man kann siga, at hann er føroyski vakthundurin yvirfyri oljufeløgunum og øðrum feløgum, sum myndugleikarnir samskifta og gera avtalur við. Talan er um kanningarstjóran á Jarðfrøðissavninum, Claus Andersen**

OLJULEITING
*Jan Müller*

Fyri at tryggja ein skilagóðan og tryggan útvikling á oljuøkinum, her verður ikki minst hugsað um samskiftið við oljufeløgini, viðgerð av umóknum ol., setti Jarðfrøðissavnið 1. januar í ár ein danskan jarðfrøðing í starv sum kanningarstjóra. Talan er um tann 55 ára gamla Claus Andersen. Hann hevur útbúgving frá lærda háskúlanum í Keypmannahavn sum cand scient í jarðfrøði men hevur fyri tað mesta arbeitt sum geofysikari í sambandi við oljuleiting og framleiðslu, serstakliga í danska partinum av Norðsjónum.

Hann byrjaði arbeiðið sum kanningarstjóri á Jarðfrøðissavninum á nýggjárinum og hevur ein sáttmála uppá tvey ár. Claus hevur royndir innan olju og gassjarðfrøði. Hevur arbeitt bæði við donskum og føroyskum spurningum og hevur eisini verið leigaður út til Føroya gjøgnum DGU og seinni GEUS í sambandi við útbjóðingarumfarið, har hann hevur mett um umsóknir og uppgávur í sambandi við borivirksemi. Hann hevur annars drúgvar royndir í oljuvinnuni. Hann hevur arbeitt hjá Mobil innan oljujarðfrøði, bæði í Grønlandi, Kanda, Portugal, Norðsjónum og í Vietnam.

Claus hevði longu drúgvar royndir í sambandi við føroysku oljutilgongdina, tá hann varð settur í starv á Jarðfrøðissavninum. Valið varð heldur ikki so torført, tá kona hansara um somu tíð varð sett sum kunningarvørur hjá savninum. Uppgávan hjá Claus Andersen er at ráðgeva Martin Heinesen og hinum á Jarðfrøðissavninum og í Oljumálaráðnum. Hann er eitt slag av supervicer fyri tað virksemi, sum oljufeløgini gera, tvs. er eitt slag av millumliði millum feløgini og føroysku stovnarnar. Hann skal m.a. tryggja, at alt fer rætt fram, og at avtalurnar, sum verða gjørdar við myndugleikarnar, verða hildnar og eru í lagi. Man kann siga, at hann er føroyski vakthundurin yvirfyri oljufeløgunum og øðrum feløgum, sum myndugleikarnir samskifta og gera avtalur við.

Hann skal koma við sjálvstøðugum metingum, fylgja upp tí, sum hendir men mest umráðandi í starvi hansara er at kunna seta skilagóðar, konstruktivar og krittiskar spurningar.

- Tað er ikki meiningin, at vit skulu gera júst tað sama arbeiði sum oljufeløgini, men vit skulu tryggja okkum, at tey halda avtalurnar, og at tey gera eitt professionelt arbeiði.

Høvuðsuppgávan hjá Jarðfrøðissavninum, sum í dag virkar sum ein sjálvstøðugur stovnur, og sum haraftrat er jarðfrøðiligi armurin hjá Oljumálaráðnum, er at tryggja, at føroyingar fáa allar upplýsingar og metingar, og at Føroyar fáa maksimalt burtur úr tí, sum oljufeløgini gera á tí jarðfrøðiliga økinum.





*Claus Andersen, kanningarstjóri á Jarðfrøðissavninum,skal koma við sjálvstøðugum metingum, fylgja upp tí, sum hendir men mest umráðandi í starvi hansara er at kunna seta skilagóðar, konstruktivar og krittiskar spurningar*

*Mynd Jens K. Vang*

### Bara sett spónin í

Claus Andersen hevur annars verið við í arbeiðinum hjá føroyingum at fyrireika seg til fyrsu boringarnar og til sjálvar boringarnar seinastu tvey árini og hevur hetta verið ein ómetaliga spennandi tíð. - Vit hava enn bara sett spónin í. Tað eru bert gjørdar tríggjar boringar. Hóast eitt fund er gjørt er tað framvegis ógreitt, hvussu stóran týdning tað hevur. Men tað er ein spennandi tíð vit ganga á møti, hóast tað er ov tíðliga at siga, um tað gongur henda ella handa vegin.

Hann heldur ikki, at alt stendur ella fellur við boringini hjá Amerada Hess í næstum. Hóast fundið hjá Hess ikki verður lønandi, so skulu kortini fleiri brunnar borast, og tann heilt stóra avbjóðingin er at kunna síggja niður undir basaltið. Tað hevur so eingin funnið nakað svar uppá enn. Her er sjálvandi spennandi at síggja, hvusu tøknin mennir seg.

Kanningarstjórin á Jarðfrøðissavninum heldur annars ikki, at man skal síggja Føroyar sum eitt isolerað og avmarkað øki, tá tað um framtíðar áhugan fyri oljuleiting ræður. Tað veldst so sanniliga eisini um, hvussu áhugin verður fyri at framleiða kolvetni á heilt djúpum vatni. -Vit fara at verða stýrd av gongdini í oljuprísinum og tøkniliga menningini, hvussu langt hon kemur. Føroyaøkið er so eisini í kapping við onnur øki í heiminum. Men gongur væl á Atlantsmótinum úr Írlandi til Barentshavið, so verður væl eisini sett meira fokus á hetta økið. Tað verður so tíðin av vísa.

### Hessboring í næstum

Boringin hjá Hess í 204/16 í bretskum øki skamt frá føroyska markinum verður sera avgerandi fyri metingina av tí fundinum, sum varð gjørt í føroyskum øki í fjør. Treytin fyri at fáa upplýsingar um eitt nú kvalitetin av reservoirinum, goymsluni, er ein testing ella royndarframleiðsla, sum ætlanin er at gera, um so er, at boringin í summar verður væleydnað. Data frá hesum brunninum fara eisini at geva týðandi upplýsingar um støddina á fundinum. Claus sigur, at hesar upplýsingar fáast ikki til vega bara við tí arbeiði, sum er gjørt higartil.

Hann sigur víðari, at tað fyri Føroyar verða eisini aðrar áhugaverdar boringar í bretskum øki í ár. Um hesir brunnarnir verða væleydnaðir kunnu teir hava stóran týdning fyri áhugan fyri tí føroyska økinum. Og her serstakliga teimum teigum á føroyskum øki, sum liggja uppat hesum komandi boringum bretsku megin markið. Claus Andersen dylur heldur ikki fyri, at umframt at kunna fáa ávirkan fyri føroyska økið kunnu umrøddu brunnar í 19. rundu í bretskum øki eisini fáa alstóran týdning fyri alt Atlantsmótið sum heild.

Úrslitini seinastu tíðini hava verið avmarkað, og her skal samtíðis havast í huga, at hetta økið skal kappast við onnur djúpvatnsøki sum Meksikanska flógvan og Vesturafrika um íløgurnar. Claus heldur tí ikki, at man kann meta um føroyska landgrunnin einsamallan ella isoleraðan, men heldur sum ein part av einum størri øki og av útviklinginum aðrastaðni í heiminum sum heild.

Claus Andersen er annars sera væl nøgdur við tað arbeiði, sum føroyskir myndugleikar hava staðið fyri. Hann heldur, at tað hevur eydnast at byggja upp eitt professionelt tøkniligt umhvørvi, sum kann taka sær av føroysku áhugamálunum. Tað hevur so eisini verið ein fyrimunur, at tað hevur borið til at byggja upp eina føroyska kompetansu yvir nøkur ár, áðrenn oljuleitingin av álvara byrjaði. – Vit hava so eisini verið eitt sindur heppin, oljuprísuin hækkaði um tað mundið, tá bjóðað varð út. Tað haldi eg heilt givið stimbraði matarlistin hjá oljufeløgunum.

### Skilagott at justera oljupolitikk

- Hvørji ráð hvur hann at geva føroyskum politikarum í sambandi við komandi oljuleiting og út frá royndunum í grannalondunum?

- Royndirnar frá grannalondunum vísa, at tað kann vera skilagott at justera oljupolitikkin sohvørt. Har eru treytirnar í útbjóðingarumførunum broyttar oftani. Oljuídnaðúrin er flýggjaligur, og tað hevur alla tíðina verið ein ballansugongd at finna røttu avveganina millum at tryggja tjóðskaparlig áhugamál og samtíðis vera attraktivur fyri váðiligar íløgur í leiting.

Eg síggi fegin, at tey bæði næstu árini verða líka so spennandi og hektisk sum hesi, ið eru farin av leitiumfarinum, sjálvandi helst við lønandi fundum.



*Claus Andersen, jarðfrøðingur her saman við konuni Anette Jægerup. Tey byrjaðu um somu tíð á Jarðfrøðisavninum, 1. januar í ár, hann sum kanningarstjóri og hon sum kunningarvørur. Bæði hava tey tí týðandi uppgávur at røkja í sambandi við komandi føroysku oljutilgongdina*

*Mynd: Jens. K. Vang*